

## Skjálvti í Guatemala

Enn er einki frætt um, at nakar stórvegis skaði hendi, tá ein jarðskjálvti var í miðamerikanska landinum Guatemala í gjár. Amerikanski jarðfrøðistovnurin sigur, at skjálvctin var 6,1 á Richter-stiganum. Sambært amerikanska jarðfrøðistovninum var jarðskjálvtin í einum øki nærhendis býnum Santiago Atitlan, sum er 68 kilometrar frá høvuðsstaðnum Guatemala City Í grannalandinum. Fólk í grannalandinum El Salvador siga, at tey kendu skjálvtan, men heldur ikki haðani er frætt um nakran skaða, skrivar Reuters.

# Fimleikari, slaktari og skipari

**Fríggjadagin 1. mai hevði Dánjal Húsgarð 25 ára starvsdag hjá Strandferðsluni. Vit prenta her eina samrøðu, sum Vilmund Jacobsen, blaðmaður á Sosialinum, hevði við Dánjal fyri einum góðum ári síðani**



Hann er lágur á vøkstri, men fimur og sterkur. Árini eru vorðin 67, men aldurin hjá honum er bara eitt tal. Uppvøkstur og barnaskúli vóru í Hoyvíkini, og lívsins skúli byrjaði umborð á snelluskipinum Hoyvík við Virgari Frýdal á Velbastað sum skipara. Teir fiskaðu í Grønlandi og løgdu veiðina upp í Føroyingahavnini.

Maðurin er Dánjal Húsgarð, sum nú í mong ár hevur siglt fyri Strandfaraskip Landsins - og seinastu árini sum stýrimaður og avloysari sum skipari við Rituni.

### Starvið ein dreymur

Dánjal var sera virkin í ungdómsárum. Hann hevur verið virkin í øllum sínum arbeiðslívi, og nú hann stundar móti pensjónsaldri er einki, sum bendir á, at hann ætlar sær at helma í.

- Mær dámar hetta arbeiði sera væl. Manningin er frálík og ferðafólkini um fjørðin tað sama. Hetta er ein dreymur. Nú árini leggjast til, er treytin fyri framhaldi, at eg kann halda fram at sigla sum stýrimaður við Rituni – og ikki sum skipari. Mær dámar at tosa við fólk, og tá tú sum stýrimaður heintar fyri ferðaseðilin, kemur mangt áhugavert prát í lag.

Vanliga eru tríggir mans á hvørji vakt, skipari, stýrimaður og maskinmaður. Manningin er eina viku umborð og eina viku í landi.

- Vaktirnar eru langar. Tú mótir á bryggjuni klokkan 06.30 og ert ikki leysur av skipinum aftur fyrr enn um 23-tíðina. Samlaða tímatalið gjøgnum eina viku er 96. Onkur løta er tó til hvíldar mitt á degi.

### Fimleikur fylti nógv

Longu áðrenn Dánjal fór fyrsta túrin til skips við Hoyvík sum 22 ára gamal á sumri í 1963, hevði hann lært til pylsumakara í Smærruni, tikið prógv sum fimleikaralærari í Danmark – og verið á slaktaraskúla í Svøríki, har hann eisini hevði arbeitt eitt skifti sum sveinur.

Eg fekk stóran áhuga fyri fimleiki, tá eg fór úr Hoyvíkar skúla og í millumskúla – ja, eg vil siga, at tað var næstan bara fimleikurin, sum hevði mín áhuga. Aðrar lærugreinir søgdu mær minni, fyri ikki at siga lítið og einki.

Eins og Dánjal gjøgnum lívið hevur havt stóra gleði av sínum førleika í fimleiki, kom eisini lærdómurin sum slaktari honum til góðar, tá hann seinni fór undir egið sláturvirki, sum hann hevði í nøkur ár.

Í heili 13 ár – frá 1. januar í 1980 – hevði Dánjal eitt sonevnt old-boys lið í fimleiki undir Havnar Fimleikarafelag. Á mannamunni varð liðið vanliga rópt "stjóraholdið hjá Dánjali í Hoyvík", og tann eina veturin var luttakaratalið omanfyri sjeyti. Nógvir av luttakarunum kundu verið nevndir, tí flestir vóru teir kendir, og millum hesar var eitt nú Eiler Jacobsen, fyrrverandi skipari og reiðari.

- Vit høvdu framsýning á hvørjum ári, og okkurt árið vóru fleiri enn fimmti fimleikarar við til framsýningina, sigur Dánjal.

### Við Fiskanes á saltfisk

Vit venda nú aftur til tíðina í 1963, tá Dánjal sum 22 ára gamal hevur verið sín fyrsta túr við Hoyvík, sum vit nevndu í áðni.

- Eg kom aftur um heystið og steðgaði stutt heima. Tá fór eg við trolaranum Fiskanesi við Pola Johannesen sum skipara og Dánjali Paula á Hvítanesi sum fyrsta stýrimanni. Vit fóru til Vesturgrønlands á saltfisk, og hesir túrar vardu vanliga einar 3-4 mánaðir.

Dánjal var við Fiskanesi, til skipið varð selt í 1965.

- Nú var eg so smátt farin at hugsa um skiparaskúla, men áðrenn eg fór í skúla í 1967, var eg fyrst ein túr við Vágbingi og síðan sum kokkur við Austerlits við Bartali á Strondum sum skipara, sigur hann.

### Livdi sum greivi

Eftir at hava tikið skiparaprógv í 1968 – og enntá við virðisløn, var hann aftur vorðin skúlatroyttur og fór nú niður til Danmarkar at sigla við einum gomlum coust'ara úr Svendborg, bygdur í 1938. Tá hann hevði siglt í eina tíð við hesum skipi, kom hann heimaftur og fór á stýrimansskúla.

- Eg fekk stýrimansprógv í 1972, og tá tímdi eg ikki at ganga meira í skúla, sigur Dánjal.

Í eini trý ár sigldi hann nú úti sum stýrimaður og skipari við stórum supertangabátum, ið sigldu um allan knøttin.

- Meðan eg sigldi undir liberiskum flaggi, hevði eg íbúð í San Fransisco. Eg var ógiftur, og tað var ein skattafyrimunur at hava bústaðin burturi. Hesi árini livdi eg sum ein greivi, sigur hann.

### Viðgerð fyri magasár

Í endanum av hesi sigling merkti hann, at okkurt var galið við maganum, og tað vísti seg, at Dánjal tá gekk við magasári.

- Eg vildi ikki viðgerast har yviri, og tyrla fleyg meg til Los Angeles, haðani eg kom við flogfari heim til Danmarkar. Eg kom á Hvidovre Sjúkrahús, har eg varð viðgjørdur og gjørdist frískur.

Eitt skifti var hann við einum sonevndum skeljasúgvara úr Frederikssund í Danmark. Hetta var ein lítil og gamal bátur. Teir veiddu skeljar til høsnafóður.

Í 1978 var Dánjal eisini við einum lítlum donskum tangabáti, sum sigldi millum grønlendskar havnir.

### Hevði egið sláturvirki

Í 1979 kom Dánjal heim aftur til Føroya og byrjaði at arbeiða hjá Føroya Keypssamtøku.

- Men her var eg bara í eitt hálvt ár ella so. Nú hevði eg hug at byrja fyri meg sjálvan sum slaktari. Fyrst fekk eg mær hølir í kjallaranum hjá pápa mínum, men tá eg nøkur ár seinni giftist og bygdi míni egnu hús, innrættaði eg meg í kjallaranum hjá mær sjálvum.

Um heystarnar fletti Dánjal seyð fyri fólk, og tá tann tíðin var av, keypti hann neyt til sláturs, umframt at hann drap og skar sundur neyt fyri bøndur.

### Fór við strandfaraskipi

- Um summarið lá sláturvirksemið stilt, og tað var tíðliga á sumri fyri 24 árum síðan, at eg fyrstu ferð fór umborð á gomlu Ternu í sigling um Vestmannasund. Tá eg í 1992 varð biðin um at føra gomlu Ternu í regluligari sigling millum Skálafjørðin og Havnina, kundi eg ikki bæði røkja sláturvirksemið og starvið hjá Strandfaraskipum Landsins.

Um hetta mundið gavst Dánjal við sláturvirkseminum.

- Tá gamla Terna seinni varð løgd, og eg fekk kjans við Rituni um Nólsoyarfjørð, tók eg eina avgerð, sum eg øll árini síðan havi verið sera fegin um, sigur Dánjal Húsgarð, ið veit um hópin av søgum at siga, sum rúm ikki er fyri á hesum sinni.